deildin

**Klaksvíkar Ítróttafelag**
**FO-700 Klaksvík**
**www.ki-klaksvik.fo**

**STOVNAÐ**
**24.08.1904**

**FORMAÐUR**
**Nichels Lützen**

**MEISTARAR (17)**
**1942, 1945, 1952, 1953, 1954, 1956, 1957, 1958, 1961, 1966, 1967, 1968, 1969, 1970, 1972, 1991, 1999**

**STEYPAVINNARAR (5)**
**1966, 1967, 1990, 1994, 1999**

**GREIPUVINNARAR (3)**
**1966, 1967, 1999**

**Í BESTU DEILDINI (66 ár)**
**1942-1943, 1945-**

**Í EUROPA (8)**
**Meistarakappingin 1992/93, 2000/01**
**Steypavinnar 1995/96**
**UEFA Cup 1997/98, 1999/00, 2002/03, 2003/04**
**Intertoto 2007/08**

# Unglingar skulu lyfta arvin

**Í Klaksvík fara teir at dúva upp á nógvar unglingar, sum verða stuðlaðir av nøkrum fáum ógvuliga royndum og álítandi veteranum**



**Saman við HB er KÍ nógv mest sigursvanda felagið í landinum, og tað ger tað til eina eyka krevjandi uppgávu at umboða KÍ í fremstu mansdeildini í fótbóltiMynd: Álvur Haraldsen**
**Mynd: Álvur Haraldsen**

Nítjan ár vóru tað frá síðsta FM heitinum hjá 66 liðnum – í 1972 – og til klaksvíkingar vunnu meistaraskapin í 1991. So runnu átta ár, áðrenn FM steypið aftur varð vunnið til Klaksvíkar.

Nú eru tíggju ár síðani KÍ síðst var á toppinum. Norðoyingum leingist eftir meistaraheitinum, men tað verður ikki roknað við, at tað fer at eydnast í ár.

Fyritreytirnar sigast ikki vera til tað. Sum so manga aðra staðni er tað slunkið í pengapunginum, og tað er ein partur av orsøkini til, at Rógvi Jacobsen, Rodrigo og Milan Culic ikki vera at síggja í bláa búnanum.

Í fjør vóru teir roknaðir at vera stjørnuspælarar í Klaksvík, men nógvu skaðarnir vóru millum orsøkirnar til, at tað hjá Rógva og Rodrigo ikki hilnaðist soleiðis, sum tað varð roknað við.

Nú hevur KÍ saðlað um. Evnagóðu unglingarnir áttu kanska at bíðað í eitt ár afturat, men tað verður longu nú roknað nógv við teimum, og so fæst at síggja, hvussu tað fer at hilnast.

Kristoffur Jakobsen, John Hammer, Eli Simonsen, Álvur F. Christiansen og Stefan Kalsø hava longu spælt nógvar dystir á besta liðnum. Nú fara fleiri aðrir 16-20 ára gamlir dreingir at fáa møguleikan. Setningurin er at mynda nýtt lið, sum skal standa seg í ár, og sum hevur møguleika næstu árini at mennast.

Í venjingardystunum hevur tað fleiri ferðir verið á góðari leið. Hvussu langt hetta kann fara at røkka er ein heilt annar spurningur.

Eitt er at standa seg væl í venjingardystum, nakað heilt annað er tað, tá ið tað verður álvari.

Hjá ungum monnum er tað ofta eitt sindur upp og niður. Umframt evnini og venjingarstøðuna hevur førleikin at tackla spentar og strongdar støður nógv at siga.

Saman við Alexander Djordjevic hevur Jákup Mikkelsen ábyrgdina av liðnum. Superveteranurin fer at verja málið, og aftrat sær hevur hann veteranar, sum ungu menninir skulu hella sær aftrat. Tað fer ikki at vera minst týdningarmikið, hvussu Jan Andreasen, Allan Joensen og Heðin á Lakjuni fara at standa seg.

Jákup Mikkelsen er einsamallur eftir FM í 1991. Ta ferðina mentust ungu menninir nógv. Um menningin verður tann sama hjá teimum nú, so áttu tað at verið vánir fyri, at KÍ – hóast skýggini hava kenst myrk – eisini næstu árini fer at verða partur av bestu deildini og kanska fer at blanda seg uppí, har tað er hugaligast at kappast.

## Hópurin hjá KÍ:

**MÁLVERJAR**
**Jákup Mikkelsen (Áður spælt við Herfølge, Molde, Partick Thistle, B36)**
**Eilif Arge**
**Rói Egholm**

**VERJA**
**Jan Andreasen**
**Jógvan Isaksen**
**Rudolf Eliassen**
**Sørmund Kalsø**
**Steffan Kalsø**
**Oddmar á Lakjuni**
**Sigmund Jacobsen**
**Ári Samson**

**MIÐVØLLUR**
**Allan Joensen (LÍF)**
**Bjarki Vágstún**
**Kristoffur Jacobsen**
**Erland Berg Danielsen (Skála)**
**Heðin á Lakjuni (B36, HB)**
**John Hammer**
**Eli Simonsen**
**Álvur Zachariassen**
**Arnold Joensen (B68, ÍF)**
**Niels Pauli Danielsen (EB/S)**
**Kristian á Lakjuni**
**Ivan Joensen**

**ÁLOP**
**Adrian S. Joensen (Víkingur)**
**Tórður Lervig (ÍF)**
**Ove Nysted (LÍF, B36)**

**TILGONGD**
**Erland Berg Danielsen, Skála**
**Adrian Stauss Joensen, Víkingur**
**Niels Pauli Danielsen, EB/S**

**FRÁGONGD**
**Rodrigo Silva, Kasakhstan**
**Milic Curci, Serbia**
**Joe Zewe, USA**
**Rógvi Jacobsen, ÍF**
**Harley Bertholdsen, givin**
**Símun Joensen, givin**
**Bjarni Jørgensen, HB**
**Emil Leifsson, Av landinum**

**VENJARI**
**Alexander Djordjevic**

**HJÁLPARVENJARI**
**Jákup Mikkelsen**


SØLA | UMBOÐAN | RÁÐGEVING | TÆNASTA

KBI Vit stuðla KÍ

Hitapumpur
Neyðstreymsanlegg
Olja
Amboð

Termografering
Gass & sveisiútgerð
Útleigan
Teknisk útgerð

KBI SP/F · KLINGRUGARÐUR 2 · FO-700 KLAKSVÍK · TEL: 470 200 · FAX 470 201 · KBI@KBI.FO · WWW.KBI.FO